**Fylgiskjal 1**

**Javntekstur**

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

| **Galdandi orðing** | **Løgtingslógaruppskotið** |
| --- | --- |
| | **§ 1**<br><br>Í løgtingslóg nr. 35 frá 16. apríl 1997 um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl., sum broytt við løgtingslóg nr. 28 frá 13. mars 2000, løgtingslóg nr. 58 frá 10. mai 2000, løgtingslóg nr. 10 frá 9. februar 2001, løgtingslóg nr. 104 frá 11. november 2010, løgtingslóg nr. 65 frá 15. mai 2012, løgtingslóg nr. 135 frá 19. desember 2014, løgtingslóg nr. 48 frá 6. mai 2016 og við løgtingslóg nr. 115 frá 24. november 2016, verður í § 3 sum stk. 2 sett: |
| **§ 3.** Treytin fyri at fáa viðbótina er, at stakur pensiónistur ikki hevur hægri ársinntøku umframt pensiónina enn kr. 60.000,-, og at giftur pensiónistur, saman við hjúnafelaga, ikki hevur hægri ársinntøku umframt pensiónina enn kr. 80.000,-. | **1.** Í § 3 verður aftaná stk. 1 sum nýtt stk. sett:<br>"*Stk. 2.* Umframt ásetingina í stk. 1 er viðbótin treytað av, at virði av nettoinntøku, ið verður skattað eftir reglunum í kapitalvinningsskattalógini, og sum er partur av inntøkugrundarlagnum sambært § 6 a, ikki er omanfyri kr. 2.000."<br><br>**§ 2**<br><br>Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað fyri útgjald frá og við januar 2018. |